miðvikan
Nr. 166 • 02. september 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

**Símun á Høgabóli:**

# Framburðsmaður sum fáur

**Símun á Høgabóli fekk eina ringa byrjan í lívinum. Sjey ára gamal misti hann bæði foreldrini, men hann kom inn á Høgaból í Saltangará til fastrina og mann hennara at vaksa upp. Skjótt vísti tað seg, at knotur vóru í hesum lítla, og hann bleiv ein tann fremsti framburðsmaður á Skálafjørðinum**


Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Í røðini Hendur ið Sleptu hava vit havt fleiri greinir um ættina hjá Símun uttan fyri Garðar í Hoyvík.

Tað er so heppið, at tað er nokk so nógv skrivað niður um ættina. Oldurabbasonur Símun uttan fyri Garða, Sverri Joensen, hevur skrivað ættarsøguna í bók, sum tó ikki er komin út alment. Við loyvi frá Sverra skal her verða gjørdur ein samandráttur av tí, sum hann hevur skrivað um abba sín Símun á Høgabóli. Hetta er ein hugtakandi lýsing av einum manni, sum saman við konuni hevði so nógvar menniskjansligar dygdir, og sum var ein av okkara fremstu framburðsmonnum.

Pápi Símun var Jógvan Simonsen, ein slóðari innan okkara fiskiskap. Hann var tann fyrsti sum lat fiskiskip byggja uttanlands. Jógvan doyði í 1885. Á sjúkraleguni bað hann systrina Malenu, ið var gift við Jógvani Petersen á Høgabóli, um at taka sær av Símuni. Sum hann segði: "Komi eg fyri meg aftur, skal eg løna tær væl, men skal eg hiðani, skal Várharra løna tær."

Tað gjørdist eisini hetta seinna, sum kom at verða galdandi. Tey átti eingi børn sjálvi, og tá ið foreldrini hjá Símuni vóru deyð, tóku Jógvan og Malena hann til sín sum teirra egna barn. Tey fostraðu eisini tvey onnur børn upp, Knút og Biritu av Vollanum, sum høvdu mist pápan.

Símun gekk fimm ár í skúla úti í Saltnesi hjá Jóannesi í Skúla. Hann fór til skips í 1896 við Delphinen, skipið, sum pápi hansara hevði latið byggja í síni tíð. Inntøkan hetta árið var 200 kr. Her var hann við í trý ár. Í 1899 fór hann við Oliviu við Pola í Dali. Tá forvann hann 500 kr, og var hetta nógv tá.

Í 1900 var Símun heima. Hann tók tey gomlu húsini á Høgabóli niður og bygdi eini nýggj, og hetta eru húsini, sum enn standa á Høgabóli. Símun skuldi vera ein stak góður og kvikur smiður. At smíða ein leyp úr heilum træi var mett at vera dagsarbeiði hjá manni, men Símun smíðaði tveir!

Tann 8.november 1900 giftist Símun við Jóhonnu, dóttir Johan í Hoyvík, sum var hálvbeiggi pápa hansara. Tískil vóru tey hálvsystkinabørn.

Í 1901 og 1902 var Símun aftur við Oliviu. Árini 1903 og 1904 var hann við til at smíða húsini til nýggju sleipistøðina á Skála.

## Vinnuliga virksemið byrjar

Á heystið 1904 fór Símun á skiparaskúla hjá Djurholm. Nú er tað, at hansara vinnuliga virksemi byrjar.

Ein sunnudag, Símun er í kirkju á Nesi, kemur Fríðrik Petersen, próstur, til hann og sigur, at reiðarin Tummas F. Thomsen á Tvøroyri hevði biðið seg útvega sær ein álítandi mann á Skálafjørðinum at keypa sild til agn til hansara skip. Símun játtaði, men Thomsen vildi fyrst síggja mannin. Símun fór suður, og tað var eisini beinanvegin leyst og liðugt.

Gjørt var av, at Símin skuldi byggja teimum hjá Thomsen eitt íshús inn í Saltangará. Hann skuldi keypa sild og frysta hana og skuldi so lata skipunum sild til agn. Afturfyri skuldi hann fáa eitt oyra av hvørji sild í løn.

Tískil gavst Símun á skiparaskúlanum. Hann fór beinanvegin undir at byggja íshúsið fyri Thomsen, og tað var liðugt at taka í nýtslu í 1905. Í 1914 keypti hann tað sjálvur og helt fram við virkseminum.

Sjálvur royndi Símun nógv eftir sild á Skálafjørðinum. Hann átti gørn og nótir bæði til sild og brisling.


*Jógvan og Malena á Høgabóli tóku Símun til sín, tá ið foreldrini doyðu*

Í fyrstuni vóru bert árabátar nýttir, men so fekk Símun Skipasmiðjuna á Skála at byggja sær ein motorbát við 9 hk Gideon motor. Báturin fekk navnið Jóhanna eftir konuni. Kostnaðurin var kr. 4.000. Nú var møguleiki at fara nógv víðari at royna. Símun tók framvegis eisini ímóti sild frá øðrum monnum.

Tá ið Jóhanna var bygd varð Hans Tausen, sum arbeiddi á Høgabóli tá, sendur til Havnar at ganga á motorpassaraskúla. Hann tók prógv í 1912. Tað var fyrstu ferð, at slíkt prógv kundi takast í Føroyum.

Báturin var brúktur til nógv annað enn sildaveiðu, sum til dømis at føra vøru úr Havn og at føra fisk umborð í farmaskip.

## Íshús og ísframleiðsla

Tá ið íshúsið var komið, fingu flestu húsini í bygdini sær íshyljar til framleiðslu av ísi. Táið frost var, bar til at taka ís oman av hyljunum fleiri ferðir um dagin, og ísin avreiddu tey til Símun. Sum tað skilst hevur verið kaldari tá um veturin enn vit kenna til í dag!


*Brúðarmynd av Símuni og Jóhonnu*